## Holst mátti lúta

Lyngby kláraði ikki at gera nakað sum helst við FCK, tá ið oddaliðið í superliguni vitjaði í Lyngby í fyrsta dystinum eftir ársskiftið. Christian Lamhauge Holst var við á liðnum hjá Lyngby, men hann og liðfelgarnir skaptu lítið og brúktu mesta av tíðini til at verja fyri álopum hjá FCK. Stóra liðið í Keypmannhaavn skoraði tó fýra mál, og Lyngby fekk eitt troystarmál, so dysturin endaði 4-1.



## El Banna aftur í Frem

Í august mánaði skifti Wassim El Banna úr Frem til Ajman Sport Clubs í Arabisku Emiratunum at spæla. El Banna var liðfelagi hjá Atla Danielsen í danska felagnum, og tað verður hann nú aftur. El Banna treivst ikki í miðeystri, og hann hevur nú leitað sær aftur til Danmarkar, har hann fer at spæla sum amatørur í Frem næstu tíðina. El Banna hevur skotið 29 mál í 66 dystum fyri Frem higartil, og hann hevur spælt á danska U19 og U21 landsliðnum.

StÍF-Neistin 22-31 (6-16):

# Finalan kom til høldar

**Uttan nakran slingur í valsinum togaðu Neista-kvinnurnar seinasta stikkið heim, tá tær staðfestu finaluplássið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Júst StÍF var mótstøðuliðið, tá Neistin byrjaði upptúrin, sum nú hevur ført liðið í FM-finaluna.

Tann dystin var annars um reppið, at Neistin mátti veittrað endaliga farvæl til finalumøguleikan, men við einum stórum taki seinastu minuttirnar fingust stigini kortini til høldar.

At sjálvsálitið er batnað síðani, var sjón fyri søgn leygardagin. Frá fyrsta bríksli varð ferðin á dystinum skrúvað í topp, og Neistin streyk avstað undan mótstøðuni.

Í álopsspælinum gekk tað fyri tað nógva heilt skjótt fyri seg. Og var møguleikin at kontra, varð hetta eisini gjørt.

StÍF hevði sum so einki at spæla fyri í dystinum. Og tó at tær eisini royndu a gera sítt, so var munurin í motivatiónsfaktorinum rættiliga sjónligur. Somikið sjónligur, at dysturin var mest sum av, tá liðini fóru til hálvleiks.

Neistin megnaði heldur ikki at halda høgu leikferðini allan dystin á tamb. Ikki tí, at tað gjørdi tann stóra munin samanlagt. Sigurin kom so als ikki í vanda, og so var fagnaðurin øgiligur, tá liðið hevði staðfest finaluplássið. Eitt finalupláss, um fyrstu vikurnar í ár tóktist hanga í einum ógvuliga klønum tráð. Men sum liðið við einum sera góðum endaspurti so ruddiliga vann sær rættin til.



*Tá avgerandi dysturin stóð á skránni, sýndi Neistin ikki minstu tekinini um gummibein*

*savnsmynd*

### FAKTA

**StÍF-Neistin 22-31 (6-16)**
10 min: 2-7
20 min: 3-11
40 min: 8-20
50 min: 16-26
**Málskjúttar**
**StÍF**: Rebekka Justinussen 9(1), Rósa Johansen 5, Ninna K. Johansen 5, Sunfríð Johansen 2, Sólfríð Christiansen 1
**Neistin**: Nicoleta Radu Hansen 8, Ása á Neystabø 5, Rakul Augustinussen 4(1), Ása Christiansen 3, Elin Holm 3, Marjun f. Danberg 3, Anna Clementsen 2
**Brotskøst**: StÍF 1, Neistin 1
**Útvísingar**: StÍF 2, Neistin 3
**Dómarar**: Kristian Joensen & Karstin Joensen

Kyndil – VB 27-39 (11-18):

# Nyttuleysur sigur

**VB vann neyðuga sigur á Kyndli. Men tað munaði lítið í stríðnum um finalusessin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað varð so sum við gleðini hjá VB, tá tær høvdu vunnið seinasta dystin hetta kappingarárið.

Hóast talan gjørdist um ein tryggan sigur á Kyndli, so gjørdust Vágskvinnurnar akkurát ov stuttar í stríðnum um finaluplássið í Sunset-kappingini.

Fyrstu løtuna av dystinum leygardagin spældi VB annars, sum trúðu tær veruliga upp á sín møguleika. Kyndil fylgdi við eina løtu, men so skrædnaði av álvara millum liðini við tí muninum, sum helst var á motivatiónini á degnum.

Eftir steðgin vóru boðini um tryggu Neista-leiðsluna á Skála tó eisini komin til spælararnar, og so vistu tær í VB, at úrslitið gjørdist tað sama, líkamikið, hvussu tær stríddust á vøllinum.

Tað vikaði tó ikki tann veruleikan, at VB á degnum var væl betra liðið, og fingu tær eisini prógvað, at tær við bronsukrónunum vóru væl stinnari enn tær á liðnum, sum gjørdist nummar fýra.

### FAKTA

**Kyndil – VB 27-39 (11-18)**
**Málskjúttar**:
**Kyndil**: Ronja Mikkelsen 7, Randi Wardum 6, Jackline Durhuus 5, Tordis Tróndarson 3, Súsanna Petersen 2, Barbara Egilstrøð 2, Eyðrit Andreasen 1, Lina Andrealyte 1,
**VB**: Daiva Toumaite 14, Gurið Mortensen 9, Bára Mortensen 5, Una Egilsdóttir 3, Carol Kjærbæk 2, Cristina Holm 2, Ruth Lisberg 1, Laila Jespersen 1, Svava Vestergaard 1, Miriam Michelsen 1,
**Brotskøst**: Kyndil 2, VB 4
**Dómarar**: Eyðun Samuelsen og Andrias F. Hansen

VÍF-Stjørnan 29-32 (14-18):

# VÍF spældi við móti oddaliðnum

**Stjørnan tók sær eingi óráð fyri, tá tær í seinasta dystinum vunnu útidystin móti VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu niðurflutta VÍF tók móti finalukláru stjørnunum, tá kvinnurnar endaðu sítt endaspæl leygardagin.

Tí var spenningurin undan dystinum ikki tann heilt stóri, men áskoðararnir fingu tó ein dyst, har bæði spenningurin ongan tíð fór heilt burtur.

Tað er lítil ivi um, at legði Stjørnan veruliga nakað fyri dagin, so varð sigurin helst væl tryggari. Men fyri vertirnar mundi tað eisini telja rætta vegin, at tær nú kundu spæla púrasta uttan tyngjandi nervarnar, sum fleiri ferðir hava spælt teimum eitt puss í vetur.

Stjørnan var annars á odda stóran part av dystinum, men VÍF royndi alla tíðina at hanga í. Og tá vertirnir eitt skifti í seinna hálvleiki skoraðu fimm ferðir á rað, stóð brádliga á jøvnum.

Tað eydnaðist tó hjá Stjørnuni at toga sigurin heim, soleiðis at stóri munurin niður til næstu liðini kundi haldast á stigatalvuni.

Fyri VÍF prógvaði dysturin, at tær væl kunnu spæla við móti liðunum í fremstu deildini, hóast tilveran komandi veturin verður í næst bestu deildini. Ein veruleika, sum VÍF tó vónar at broyta umvegis áheitan sína til HSF.

### Fakta um dystin

**VÍF-Stjørnan 29-32 (14-18)**
10 min: 3-5
20 min: 6-12
40 min: 20-23
50 min: 25-26
**Málskjúttar**
**VÍF**: Fríða Marjunardóttir 6, Ioana Rapa 6, Rannvá á Rógvu 4, Torgunn Johannesen 4, Liljan Djurhuus 3, Heidi Joensen 3, Marita Johansen 2, Elia Leo 1(1)
**Stjørnan**: Simona Petersen 8(2), Durita Christophersen 7, Maria við Neyst 6, Joan M. Djordjevic 2, Bára S. Klakstein 2, Anna Kristina Samson 2, Durita Mikkelsen 1, Durita Ljósstein 1, Una Olsen 1
**Brotskøst**: VÍF 3, Stjørnan 3
**Útvísingar**: VÍF 2, Stjørnan 3
**Domarar**: Ragnar Simonsen & Rúni Mohr